# Tvey hálvtíðarstørv í SavnsGulli

**Verkætlanin „SavnsGull“**
**SavnsGull er ein bjargingarætlan, har skjøl og bond í Kringvarpssavninum skulu talgildast og gerast atkomandi fyri almenningin**

**Arbeiðsuppgávur**

- Viðgera pappírsskjøl og skrivligt tilfar
- Skráseta
- Annað fyrifallandi arbeiði

**Førleikar**

Vit vænta, at tú:

- hevur góðan kunnleika til føroyskt skriftmál
- hevur arbeitt við teldum
- ert fús/ur at taka við læru
- hevur arbeitt í toymi
- dugir at arbeiða sjálvstøðugt
- setur góðsku høgt
- hevur bindindi at sita og arbeiða við einstáttaðum arbeiði

**Vit bjóða**

- eitt starv, har tú ert partur av einari verkætlan, ið varðveitir føroyska søgu
- góðar arbeiðsfelagar og arbeiðsumstøður

**Setanarviðurskifti:**

Størvini verða sett 1. januar 2019 eftir sáttmála millum Starvsmannafelagið og Fíggjarmálaráðið, lønarflokkur II. Fyrstu 3 mánaðirnir er royndartíð.

Arbeiðstíðin verður 4 tímar um dagin. Arbeiðstíðin í tí eina starvinum verður frá kl. 8:00-12:00, og í hinum starvinum verður arbeitt frá kl. 12:00-16:00. Um serlig ynski eru til arbeiðstíðirnar, skal hetta standa í umsóknini. Arbeiðsstað er í hølunum hjá Kringvarpinum – Norðari Ringvegur 20, 100 Tórshavn.

Send umsókn við avritum av prógvum, CV og viðkomandi skjølum í teldubrævi til **mass@kvf.fo.** Umsóknarfreistin er 1. desember 2018.

Tú kanst kunna teg um verkætlanina SavnsGull á kvf.fo/savnsgull og facebook.com/savnsgull. Vilt tú vita meira um starvið, ert tú vælkomin at seta teg í samband við Mass Hoydal, verkætlanarleiðara, tlf. +298 296536, teldupost: mass@kvf.fo

KRINGVARP FØROYA

*Kringvarp Føroya er sjálvstøðugur, almennur stovnur, sum virkar óheftur av politisku skipanini. Eitt stýri við 7 limum stjórnar stovninum. Virksemið verður fíggjað við kringvarpsgjaldi og inntøkum frá spølum og lýsingum. Kringvarp Føroya hevur fýra deildir; Aktuelt, Mentan, Tøkni og Fyrisiting. Fíggjarætlanin er 57,5 mió kr. Í Kringvarpi Føroya eru 76 ársverk.*